## Ráðharri fær lønarseðlar

Í Íslandi hasva sjúkrarøktarfrøðingarnir sett sær fyri at rætta eina misskiljing, sum er íkomin í sambandi við, at lønarlagið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum hevur fingið almenna umrøðu í seinastuni. Felagið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum fer tí at handa Guðlaugi Þór Þórðarsyni, heilsumálaráðharra lønarseðlar, sum vísa lønarviðurskiftini. Byrjunarlønin hjá sjúkrarøktarfrøðingum er umleið 20.000 krónur, og tað er „einki“, sigur fakfelag teirra.



*Guðlaugur Þór Þórðarson er íslendskur heilsumálaráðharri*
*(Mynd: Vísir)*

## Sangur og møtir í Klaksvík

Sangbólkurin VITIN og aðrir skipa komandi um vikuskifti fyri møtirøð í Klaksvík. Byrjað verður í Betesda fríggjakvøldið klokkan 20, har sangbólkurin VITIN luttekur. Bólkurin Vitin við Torkil Mørkøre sum musikalskum leiðara, er kendur um alt landið fyri sín lætta sang. Leygarkvøldið kl. 20 verður farið niðan í nýggju Badmintonhøllina, har Jógvan Mortensen & Co luttaka. Jógvan Mortensen og aðrir hava mannað nýggjan bólk sum longu hevur sett síni spor runt um í Føroyum. Kristina Bærentsen, sum er kend um alt landið, bæði í samkomum og í festivalhøpi, er gestasangari hetta kvøldið. Poul Færø og Rógvi Joensen tala. Aftaná verður kaffi at fáa. Møtidrøðin heldur fram í Badmintonhøllini sunnukvøldið, har góðar sangkreftir luttaka og Poul Færø, Levi Joensen og Rógvi Joensen tala. Stórt sæð allir luttakararnir hava sína dagligu tænastu í samkomuni Betesda í Klaksvík, og fyrireikarnir vóna at so mong sum gjørligt koma.

# Okkara skylda eru seinastu hyggjararnir



*Væl ílætin fór Øssur Wintereig í dag niðan á Húsareyn, so hann við egnum eygum kundi síggja, hvat fyriferst í yvir 100 metra høgu sendimastrini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast hann kallar støðuna fyri »eitt flatt fornemmilsi«, so er Øssur Winthereig púrasta samdur í, at tað gevur ikki meining at framleiða sjónvarp í verandi støðu**

SJÓNVARP
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mikudag er lítið av fólki til arbeiðis á tíðindadeildini á sjónvarpspartinum hjá Kringvarpinum.

Tí er dagurin í dag ikki stórt øðrvísi hjá starvsfólkunum, enn aðrir mikudagar eru. Men bæði mána- og týsdagin órógvaði niðurslitna sendinetið.

- Í løtuni vita vit ikki tað heilt stóra. Vit fóru heim klokkan 16 í gjár, og í morgin møta vit klokkan 9. Vit royndu bæði mána- og týsdagin at arbeiða, sum um vit skuldu í luftina klokkan 19, og fáa vit ikki annað at vita, so verður tað eisini støðan í morgin, sigur tíðindaleiðarin í Sjónvarpinum, Øssur Winthereig.

- Og um vit fáa at vita, at einki fer í luftina í morgin heldur, so hava vit nóg mikið at brúka tíðina til. Eitt nú til at tosa um viðurskifti, sum vit ongan tíð annars hava tíð til, tá deadline stressar arbeiðstímarnar, heldur hann.

### Mugu røkja útjaðaran

Øssur Winthereig dylur tó ikki fyri, at verandi støðan er djúpt frustrerandi.

- Mánadagin høvdu vit jú alt klárt. Har var nógv tilfar at senda, og eisini hildu vit tað gott tilfar. Tí var tað eitt rættiliga flatt fornemmilsi, tá vit bara máttu ásanna, at her var ikki tað stóra at gera.

- Í so máta var støðan nakað øðrvísi í gjár. Tá royndu vit at arbeiða, sum um vit skuldu í luftina. Men tá tað var greitt, at hetta ikki bar til, góvust vit bara. Men talan var jú framvegis um eina frustrerandi støðu, sum als ikki er nøktandi. Eisini hjá hyggjarunum, sum jú rinda túsundtals krónur í kringvarpsgjaldi, men sum nú ikki fáa nakað afturfyri.

Men tit hava møguleika at røkka parti av hyggjarunum umvegis Televarpið og alnetið. Hví valdu tit tann møguleikan frá?

- Har eri eg samdur í teimum grundgevingum, sum kringvarpsstjórin og formaðurin fyri Kringvarpsstýrinum hava ført fram.

- Tá vit eru ein public service stovnur, so er tað okkara skylda at veita til øll. Tað er ein skylda, sum privatir veitarar – t.d. Televarpið – ikki hevur. Okkara skylda er at hugsa um tey seinastu prosentini, sum ikki hava møguleika at síggja Televarpið. Og tað er ein skylda, sum vit ikki tóku í álvara, um vit bara søgdu, at Televarpið og alnetið eru nóg mikið til at fara í luftina.

- Sjálvandi er talan so eisini um eina kappingarstøðu. Og Kringvarpið eigur ikki at blanda seg upp í eina kapping millum eitt nú Televarpið og Canal Digital. Televarpið hevur tann fyrimun fram um onnur, at tey sleppa inn á signalið hjá okkum, áðrenn hetta fer niðan á Húsareyn. Og tí er tað skeivt, um eitt privat felag kann fáa fyrimun av verandi støðu.

### Funnið kikaran fram

Í gjár førdi Kringvarpsstjórin fram, at avgerin um als ikki at senda ikki skuldi fatast sum ein provokatión til politiska myndugleikan. Og eisini hesum er Øssur Winthereig samdur í.

- Vit hava fyrst og fremst okkara skyldu at hugsa um. Er nøkur provokatión, so er hendan einar 80 metrar omanfyri Húsareyn, har brekið í sendimastrini er. Og nú dagurin kortini er leysur, fari eg at hyggja nærri at hesum. Eg havi júst latið sonin í, og kikarin er funnin fram. So nú fara vit báðir ein biltúr niðan á Húsareyn, so eg kann síggja, hvussu leikur fer, sigur Øssur.



*Longu í somu løtu, sum hon varð tilnevnd landsstýriskvinna, fekk Kristina Háfoss fyrsta akutta trupulleikan á borðið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Vil bera skjótt at

**Sendinetið hjá Kringvarpinum er partur av samgonguskjalinum, og Kristina Háfoss setti longu fyrsta dagin arbeiðsbólk at gera tilmæli um hetta**

SJÓNVARP
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mest sum í somu løtu, sum Kristina Háfoss varð sett í starv sum landsstýriskvinna í skúla- og mentamálum, fekk hon ein akuttan trupulleika at taka støðu til. Nevnliga sendinetið hjá Sjónvarpinum.

Og hóast tað nú bert eru tveir dagar síðani, at hon setti seg í sessin, so er hon longu farin í holt við at loysa tann trupulleikan.

- Tað er eingin loyna, at tað er gjørt ov lítið við sendinetið nú í nógv ár. Og tað er harmiligt, at eingin avgerð enn er tikin um, hvussu arbeiðið við at endurnýggja netið skal fara fram.

Men í samgonguskjalinum hava tit staðfest, at netið skal endurnýggjast?

- Tað er rætt, men enn er einki arbeiði gjørt í so máta. Nú er trupulleikin vorðin heilt akuttur, og eg havi biðið embætisfólk um at fara til verka. Í fyrsta lagi skal ein lýsing gerast av, hvørjar ábøtur eru átrokandi neyðugar. Í øðrum lagi skal ein ætlan gerast um, hvussu tað verður arbeitt frá nú og fram til tann dagin, tá eitt nýtt sendinet er klárt. Og í triðja lagi havi eg biðið um at fáa neyðuga grundarlagið til at taka støðu útfrá, tá avgerð skal takast um, hvat sendinet verður valt.

- Akkurát akutta trupulleikan við mastrini á Húsareyni fái eg so ikki sagt tað stóra um. Men eg vóni so, at arbeiðsbólkurin í Mentamálaráðnum kann hava eitt líðugt tilmæli um ein ella tveir mánaðir.

Ónøgd hevur verið um, at Sjónvarpið als ikki hevur sent, hóast møguleiki er at senda til part av landinum gjøgnum Televarpið og at leggja sendingar út á netið. Ert tú samd í teirri avgerð, sum leiðslan í Kringvarpinum hevur tikið.

- Tað er eitt mál, sum eg ikki fari at leggja meg út í. Leiðslan í Kringvarpinum hevur tikið sína støðu í hesum, og eg haldi tað als ikki vera upp til mín at blanda meg í dagliga leiðsluarbeiðið, sigur Kristina Háfoss.